Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum
(Ásetingar í sambandi við kanningar av vanlukkum á sjónum, talgilt samskifti, sjóuppmerking, gjald fyri sýn o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001 um trygd á sjónum, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 19. mai 2008, § 2 í løgtingslóg nr. 71 frá 30. mai 2011, løgtingslóg nr. 61 frá 17. mai 2013, løgtingslóg nr. 122 frá 15. desember 2014, løgtingslóg nr. 85 frá 29. mai 2017, løgtingslóg nr. 51 frá 7. mai 2019 og § 58 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 13 verður orðað soleiðis:

"**§ 13.** Landsstýrisfólkið ásetir reglur um kanning av vanlukkum á sjónum, sum viðvíkja føroyskum skipum, og øðrum vanlukkum á sjónum við tilknýti til Føroyar, undir hesum vanlukkum, fevndar av altjóða koduni um kanningar av vanlukkum á sjónum, til tess at staðfesta vanlukkuorsøkina og til at fyribyrgja vanlukkur, og kann, um tørvur er á tí, brúka útlendska serfrøði til tess.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um skyldu at boða Sjóvinnustýrinum frá um vanlukkur á sjónum sambært stk. 1."

2. Í § 19, stk. 1, 2. pkt. verður "stk. 1" broytt til: "1. pkt."

3. § 19 b, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:

"Upplýsingar, savnaðar í sambandi við kanningar, sum verða gjørdar sambært altjóða koduni um kanningar av vanlukkum á sjónum sambært § 13, skulu ikki verða nýttar til annað endamál enn kanningararbeiði:"

4. § 19 b, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 2.* Persónar, sum á ein hvønn hátt eru við í arbeiðinum at kanna vanlukkur sambært altjóða koduni um kanningar av vanlukkum á sjónum sambært § 13, hava undir ábyrgd sambært revsilógarinnar §§ 152 og 152 a-152 e skyldu til mótvegis óviðkomandi at halda loyniligt tað, sum teir fáa kunnleika til í sambandi við kanningina."

5. Aftan á § 21 verður í kapittul 3 sett:

"**§ 21 a.** Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at skrivligt samskifti við Sjóvinnustýrið um viðurskifti, sum eru fevnd av hesi løgtingslóg ella reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg, skal vera elektroniskt.
Landsstýrisfólkið kann áseta, at tað í ávísum førum kann verða givið undantak frá skylduni at samskifta elektroniskt.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um elektroniskt samskifti, undir hesum reglum um nýtslu av ávísum kt-skipanum, serligum talgildum fílasniðum, talgildari undirskrift o.tíl."

6. Aftan á § 31 verður sett:

"**§ 31 a.** Landsstýrisfólkið ella tann myndugleiki, sum landsstýrisfólkið gevur heimild til tess, kann stovna

neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerkingar.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um siglingarskipanir og sjóuppmerkingar."

7. § 47 verður orðað soleiðis:

"**§ 47.** Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um gjald fyri sýn, ið Sjóvinnustýrið útinnir sambært hesi løgtingslóg.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um gjald fyri sýn, ið verða umbiðin, undir hesum sýn umborð á útlendskum skipum. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur viðvíkjandi gjaldi fyri arbeiði við góðkenningum ella loyvisbrøvum sambært hesi løgtingslóg.
Stk. 3. Fyrsta sýn er ókeypis.
Stk. 4. Eru brek funnin í sambandi við havnastatseftirlit av einum útlendskum skipi, sum gera, at skipið kann verða lagt, kann Sjóvinnustýrið krevja gjald fyri eftirlitið. Skipið verður ikki leysgivið, fyrr enn kravið er goldið ella trygd sett fyri tí.
Stk. 5. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um gjaldsháttt, freistir fyri inngjald, áminningarskriv, gjøld og rentur o.tíl. viðvíkjandi gjøldunum sambært stk.1-3."

8. § 48 verður orðað soleiðis:

"**§ 48.** Klassafeløg, virki og einstaklingar, nevnd í §§ 22 og 23, kunnu krevja gjald fyri arbeiði teirra."

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. § 1, nr. 6 kemur í gildi 1. juni 2024.

Samtykt á Løgtingi hin 13. mai 2024 við 28-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 14. mai 2024

stjóri